Seta fólkafundin hjá Heilsuhjálparafelagnum

Leygardagin 20. september 2014 kl. 14.30

Eg fari fyrst av øllum at takka Heilsuhjálparafelagnum fyri at hava boðið mær at seta fólkafundin hjá felagnum í dag.

Sum landsstýriskvinna í almannamálum, havi eg *enn* ábyrgd av eldraøkinum, og tí at økinum, har heilsuhjálparar er nógv størsti fakbólkurin. Men sum øllum kunnugt verður eldraøkið eftir ætlan lagt út til kommunurnar 1. januar 2015, og tí havi eg hug at hugleiða eitt sindur um hetta. Hvat merkir tað fyri tykkum, heilsuhjálparar, at økið verður lagt til kommunurnar at umsita fult og heilt? Og hvat fer tað at merkja fyri okkara eldru borgarum?

Tikið verður til, at leingi er tað, ið væl skal vera.

Í politisku skipanini hevur spurningurin um at leggja eldraøkið til kommunurnar at umsita verið í á breddanum seinastu 20 árini. Við eldralógunum, ið Løgtingið samtykti í vár, fæst loksins greiða á fløkta myndugleikabýtinum millum land og kommunur, og samsvar verður ímillum vald og gjald.

Í Føroyum hava vit ikki havt eina eldralóg. Vit hava alskyns lógir á øllum øðrum økjum, men viðurskiftini hjá teimum eldru eru ongantíð samlað í lóggávu. Tænastustøðið er ógvuliga ymiskt kring landið í dag, og vantandi gjøgnumskygni valdar, og tey eldru hava onga veruliga lógartryggjaðan rættartrygd.

Endamálið við lógini um heimatænastu, eldrarøkt er at skapa karmar, sum kommunurnar skulu virka undir, tá tær fara at umsita eldraøkið.

Tænastan, ið verður løgd til kommunurnar er hin sama, sum vit kenna hana í dag. Tað er tann sameinda tænastan, ið snýr seg um:

- Eldrarøkt (røktarheim, eldrasambýli o.l.)
- Heimatænasta (heimasjúkrarøkt, heimahjálp, økisterapi)
- Fyribyrgjandi tænastur (umsorganar arbeiði)
- Ansingarsamsýning

Lógin viðvíkjandi tænastum avspeglar í stóran mun virksemið, sum tað er í dag.

Tó eru nakrar nýggjar ásetingar millum annað viðvíkjandi fyribyrgjandi heimavitjanum, fráboðan frá fakfólki um ónøktandi umstøður hjá borgarum, og krav um eftirlit.

Tá hugsað verður um sjálvt tænastustøðið, verður hetta nú fyri fyrstu fer ásett við lóg. Tað verða fakfólk, ið skulu meta um tørvin, og tænastan, ið verður veitt, skal standa mát við tørvin.

Málið er, at fólk skulu liva sum longst í egnum heimi, og verða so væl fyri, sum gjørligt. Og kommunurnar skulu sum minstakrav tryggja, at borgarar, sum hava tørv á persónligari hjálp, røkt og stuðli, fáa neyðugu hjálpina.

Starvsfólk skulu fráboða kommununi, um tey gerast varug við, at borgarar hava tørv á persónligari hjálp, røkt ella stuðli ella á annan hátt liva undir ónøktandi korum.

Fleiri kommunur hava nú tær fyrireika seg til yvirtøkuna, valt at skipa eldraøkið í integreraðum leiðslubygnaðum, har øll tilboðini til borgaran og allar tvørgangandi tænastur verða skipaðar í eina eind, og har heimatænasta og búpláss verða skipaðar undir somu leiðslu. Hetta fer vónandi at hava við sær fleiri menningarmøguleikar fyri eitt nú starvsfólkini.

Eitt mál, sum Heilsuhjálparfelagið og eg hava umrøtt á fundi, er ynski um at heilsuhjálparar eisini fáa møguleika at arbeiða fulla tíð. Ynski um at kunna liva av síni útbúgving – at kunna forsyrgja sær og sínum – stuðli eg av fullum hjarta, og meti eg vera eitt sera týdningarmikið mál at seta sær. Hetta er ein problematikkur, sum kommunurnar eru vitandi um, og eg ivist onga løtu í kommunurnar fara at gera sítt til, at royna at finna loysnir. Tað at eitt nú nú heimatænastan og búpláss verða skipa undir einari leiðslu, kann geva fleiri møguleikar.

Tað er nú um 13 ár síðan at heilsuhjálpara útbúgvingin var sett á stovn í Føroyum, og síðan tá hava umleið 40 heilsuhjálparar fingið prógv um árið.

At tað er so stórur áhugi fyri at útbúgva seg innan hetta fak, er ómetaliga gott, og tørvurin eftir heilsuhjálparum er vaksandi. Eldralógin leggur stóran dent á fakliga førleikan, og tí er tørvurin á fakliga kompetentum starvsfólkum at taka sær av okkara eldru, stórur og vaksandi, nú alsamt fleiri liva longur og vit tí fáa nógv fleiri eldri.

Eg havi fult álit á, at kommunurnar – saman við góðum starvsfólki - eru førar fyri at lyfta hesa uppgávu til fulnar, og saman tryggja okkara eldru eina góða tænastu.

Eldraøkið er eitt økið, sum allatíðina er í broyting, og fari eg at nýta høvi at takka heilsuhjálparum kring landi, fyri tykkara jaliga hugburð og samstarvsvilja. Tit hava tikið ímóti fleiri broytingum og avbjóðingum gjøgnum árini, og eri eg vís í, at tit eisini hesuferð verða ein viðspælari hjá nýggja arbeiðsgevaranum, sum tit fáa í næstum. **Takk fyri – og góðan fólkafund.**

**Annika Olsen**

Landsstýriskvinna í almannamálum